planet.fo
Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# "Stokkhólmssyndromið" – hart og kontant

**Petur Pólson ummælir nýggju fløguna hjá 200 "Stokkhólms-syndromið" og teirra útgávukonsert farna leygardag**

**Petur greiður frá:**
Nýggja fløga 200, Stokkholmssyndromið, hevur sítt navn eftir teirri sinnisstøðu, sum gíslar koma í, tá teir velja at elska sínar gíslatakar, fyri á tann hátt at koma ígjøgnum eina traumatiska uppliving.

Soleiðis, staðfesta 200, eru vit. Føroyingar. Vit hava stokkholmssyndromið, og ongin skal koma og siga okkum, at tað er ein sjúka, ein vrangstøða, ein ímynd.

200 hava arbeitt leingi við nýggju fløguni. Løgini eru meiri gjøgnumførd og gjøgnumarbeidd onkurvegna. 200 ljóða enn sum 200. Gittar-riffini eru pumpandi, gróthørð, tónleikurin er ágangandi og bassur Mikaels saman við trummum Una eru ein betongbotnur av hørðum, men samstundis einastandandi góðum, punkrokki.

Á reinsarínum í Havn løgdu 200 fyri við lagnum "Leoland", sum eisini er fyrsta lagið á nýggju fløguni. Lagið spyr, hvør ræður í Leolandi, og Niels bjóðaði beinanvegin áskoðarafjøldini at spyrja sama spurning. Sum heild eru 200, tó at teir eru punk rokkarar, sera snildir framførarar, og megna sannførandi at fáa fjøldina við. Inn í tónleikin. Tónleikurin er sera væl stuðlaður av Jónas Bloch, og ljóðaði tað sera væl.

## Eisini Høgni Hoydal fekk eitt skot

Petur Pólson greiður frá, hvussu eisini formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal, fekk eitt skot frá 200 á útgávukonsertini.

**Petur greiður frá:**
Høgni Hoydal fekk eisini eitt skot. Niels segði frá, hvussu hann hevði lovað, at um Høgni og hansara fólk fóru í samstarv við Miðflokkin, tá teir høvdu vunnið valið, so skuldi hann hoyra fyri tað. Og tað gjørdi hann. "Eg segði tað við teg, eg ávaraði teg. Tú skuldi halda fingrarnar langt vekk frá reyvini á Jenisi", vóru orðini. Høgni Hoydal kom á konsert, men hann var ov seinur at fáa hetta skotið við.

Saman við fleiri løgum av nýggju fløguni, rapaðu klassikarar eisini úr 200. "Tað stóra bankaránið", "Tað einasta góða", "Fjern den klud" og so framvegis. 200 spældu ikki (ella eg fangaði tað so ikki, so eg gangi út frá tí staðfesting) "Muscleman Blað", sum óivað er teirra størsta hitt. Niels hevur einaferð sagt, at eftir hann hoyrdi remiksið, sum maður:glotti gjørdu, fara teir ongantíð aftur at spæla tað. Hart og kontant, men soleiðis eru 200. Harðir og kontantir, uttan nakað sum helst kompromis. Nýggja fløgan prógvar tað, og 200 staðfestu tað so dyggiliga á palli leygarkvøldið.




